## Luca Toni størsti sjónleikarin

Um vikuskiftið spældu Dortmund og Bayern ímóti hvørjum øðrum í týsku landskappingini, og fyri dystin gjørdi verjuspælarin Neven Subotic hjá Dortund vart við seg. Hann kallaði nevniliga italska álopsspælaran Luca Toni, sum spælir Bayern, fyri heimsins størsta sjónleikara. - Luca Toni er vandamikil, men hann er eisini tann størsti sjónleikarin. Hann letur seg detta av næstan ongum og fær fleiri fríspørk, enn nakar annar fær, segði Subotic.




## Inter gjørdi arbeiðið

Inter spældi um vikuskiftið ímóti Lecce, sum liggur í niðara parti av stigatalvuni, og oddaliðið í Seriu A gjørdi sítt arbeiði til fulnar. Inter vann dystin 3-0. Svenskarin Zlatan Ibrahimovic legði Inter á odda. Veteranurin Luis Figo økti til 2-0, áðrenn Dejan Stankovic gjørdi tað til 3-0 10 minuttir fyri leiklok. Inter liggur á odda í Seriu A, og næsta vikuskiftið spæla teir oddadyst ímóti AC Milan.

# Mansfinalan




Steypavinnarar hjá monnum 2009. Neistin. Aftastir standa Dejan Lacok, Áki Mørk, Jón Ludvík, Blagoje Buha, Magnus Matras, Birgir Poulsen, Jens Mohr, Bartal Hansen og Jugoslav Djumic. Í miðraðnum eru Karl Oddmar Rasmussen, Carl Herup Olsen, Finnur Hansson, David Edwardsen, Bogi Berg, Ári Dam og Eirikur Magnussen. Fremstir sita Ingi Olsen, Tróndur Kragesteen og Jakob Jónsson

*Mynd: Álvur Haraldsen*

*Sum venjari mátti Ingi Olsen sjálvandi finna seg í at verða tveittur upp í loft nakrar ferðir, tá steypið var heima*

*Mynd: Álvur Haraldsen*





## Sá hann í kassanum

**Tú ert noyddur at taka kjansin í eini slíkari støðu, sigur Finnur Hansson, sum skeyt seinasta málið í steypasigrinum hjá Neistanum**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Tað stóð 26-26 á talvuni, og Neistin hevði koyrt eitt langt álop. Somikið langt, at dómararnir høvdu armin á lofti, tá Neistin fekk tríggjar metrar.**

**Uppstilling varð gjørd framman fyri verjumúrin, og við einum kanónskoti eydnaðist Finni Hansson at skjóta tað, sum vísti seg at verða avgerandi málið í dystinum.**

**- Tað er einki annað at gera. Eg visti, at var tað ikki nú, so kundi tað gera tað sama, segði Finnur, tá vit fingu orðið á hann í løtunum eftir dystin.**

***Men hugsar tú ikki um vandan við at brenna, tá tú stendur í eini slíkari støðu?***

**- Tað kanst tú ikki. Tú noyðist at síggja bóltin í kassanum, longu áðrenn tú hugsar um sjálvt skotið, og tíbetur riggaði tað so eisini, segði Finnur, sum annars segði, at finalan gjørdist júst so torfør, sum hann hevði roknað við.**

**- Kyndil gevur jú ongantíð upp. Teir eru av sonnum eitt finalulið, og tí kendu vit okkum ongan tíð tryggar. Fleiri okkara minnast eisini finaluna í 2000, tá vit mistu eina trygga leiðslu, og tað var ein vandi, sum vit vóru noyddir at skumpa úr høvdinum.**

***So tykkara partur í so máta var kanska fyrst og fremst á mentala økinum?***

**- Tað var tað. Ein finala verður altíð vunnin í høvdinum. Somikið einfalt er tað, sigur Finnur Hansson.**